# ST - sáttmálin um rættindi teirra brekaðu

## *Inngangur*

*Tey lond, ið luttaka í hesum sáttmála,*

(a) *Minna á* tær aðalreglur, sum eru lýstar stovningarskjali Sameindu Tjóða, sum viðurkennur, at menniskjuni eru virðing og tign íborin, og at hvørt mansbarn eigur somu ómissandi rættindi, og at hetta er støðið undir frælsi, rættvísi og friði í heiminum,

(b) *Viðurkenna,* at Sameindu Tjóðir í heimsyvirlýsingini um mannarættindi og í altjóða mannarættindasáttmálunum hava lýst og samtykt, at ein og hvør hevur rætt til øll tey rættindi og alt tað frælsi, ið er lýst í teimum, uttan mun av nøkrum slag,

(c) *Vátta av nýggjum* heimsfevnandi, óskiljandi, og sínámillum treytaða og samantvinnaða skyldskapin í øllum mannarættindum og grundleggjandi frælsum, og tørvin á, at fólk, ið bera brek, fáa tryggjað, at tey – uttan mismun - til fulnar kunnu brúka tey,

(d) *Minna á* altjóða sáttmálan um búskaparlig, sosial og mentanarlig rættindi, altjóða sáttmálan um borgarlig og politisk rættindi, altjóða sáttmálan um at beina fyri øllum mismuni á fólkasløgum, altjóða sáttmálan um at beina fyri øllum mismuni mótvegis kvinnum, altjóða sáttmálan móti píning og aðrari óndari, ómenniskjaligari ella niðrandi viðferð ella revsing, altjóða sáttmálan um rættindi barnsins, og altjóða sáttmálan um at verja rættindini hjá øllum arbeiðarum, sum flyta millum lond, og familjum teirra,

(e) *Viðurkenna*, at brek, sum hugtak, broytist, og at brek er úrslit av sínámillum ávirkan millum fólk, sum eru viknað, og forðingum, ið standast av hugburði og umhvørvi, sum tarnar teimum til fulnar og á virknan hátt at verða við í samfelagnum á jøvnum føti við onnur,

(f) *Viðurkenna* týdningin av teimum meginreglum og vegleiðingum, sum eru ásettar í heimsvirkisætlanini fyri fólk, ið bera brek og í fyrimyndarreglunum um javnar møguleikar fyri fólk, ið bera brek, ið viðvirka til at fáa fram, orða og eftirmeta politikkar, ætlanir, skipanir og tiltøk á lands-, økis-, og altjóða stigi, sum virka fyri at javnseta møguleikar hjá fólki, ið bera brek,

(g) *Leggja herðslu* á týdningin av at gera evni um brekað til almenn evni, sum eru ein samantvinnaður partur av viðkomandi strategium um burðardygga menning,

(h) *Viðurkenna eisini,* at mismunur gjørdur móti einum og hvørjum fólki grundað á brek, er brot á viðfødda tign og virði fyri menniskjanum,

(i) *Viðurkenna harumframt* ymiskleikan hjá fólkum, ið bera brek,

(j) *Viðurkenna* tørvin á at virka fyri og verja mannarættindi hjá øllum fólkum, ið bera brek, eisini teimum, ið krevja víðfevndan stuðul,

(k) *Stúra fyri,* at hóast hesi ymisku amboð og tiltøk, fara fólk, ið bera brek, framvegis at verða fyri forðingum, tá ið tey skulu luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við onnur, og teirra mannarættindi fara at verða skerd í øllum pørtum av heiminum,

(l) *Viðurkenna* týdningin av í altjóða samstarvi at bøta um liviumstøðurnar hjá fólki, ið bera brek, í einum og hvørjum landi, serstakliga í menningarlondum,

(m) *Viðurkenna* virðismiklu íkøstini, bæði verandi og framtíðar, sum fólk, ið bera brek, alment veita til trivnaðin og fjølbroytni í sínum samfeløgum, og viðurkenna, at virkanin fyri, at fólk, ið bera brek, til fulnar fáa síni mannarættindi og grundleggjandi frælsi og fulla luttøku í samfelagnum, fer at elva til eina økta kenslu av at hoyra til, og elva til týðandi framstig í menniskjaligari, sosialari og búskaparligari samfelagsmenning, og fer at beina fyri fátækradømi,

(n) *Viðurkenna* tann týdningin, tað hevur fyri fólk, ið bera brek, at ráða sær sjálvum og verða óheft, undir hesum at hava frælsið til at taka egnar avgerðir,

(o) *Hugsa um,* at fólk, ið bera brek, eiga at fáa høvið til at verða við, har avgerðir verða tiknar viðvíkjandi politikkum og skipanum, eisini teimum sum beinleiðis viðvíkja teimum,

*Stúra fyri* teimum truplu umstøðunum hjá fólki, ið bera brek, sum eru útsett fyri nógvum ella grovum mismuni, grundað á rasu, lit, kyn, mál, átrúnað, politiska ella aðra áskoðan, tjóðskaparligan, etniskan, innføddan ella samfelagsligan uppruna, ogn, aldur ella samfelagsstøðu,

*Viðurkenna,* at kvinnur og gentur, ið bera brek, ofta eru í størri vanda fyri harðskapi, løsti, misrøkt og vanrøkt, ringari viðferð ella misnýtslu bæði í og uttanfyri heimið,

*Viðurkenna,* at børn, ið bera brek, hava fullan rætt til øll mannarættindi og grundleggjandi frælsi á jøvnum føti við onnur børn, og havandi í huga tær skyldur sum tey limalond, ið eru partar av altjóða sáttmálanum um rættindi barnsins, hava tikið undir við,

*Leggja dent á* tørvin at fáa kynsatlit inn í allar royndir og tiltøk, ið gera, at fólk, ið bera brek til fulnar kunnu njóta mannarættindi og grundleggjandi frælsi,

*Varpa ljós á* tann veruleikan, at meginparturin av teimum, ið bera brek, liva í fátækradømi, og í hesum sambandi viðurkenna álvarsama tørvin at gera nakað við ringu ávirkanina, sum fátækradømi hevur á fólk, ið bera brek,

*Hava í huga,* at treytirnar fyri friði og tryggum viðurskiftum, grundað á fulla virðing fyri endamáli og aðalreglum í ST-stovningarskjalinum og viðurkenning av nýtiligum mannarættindaamboðum, ikki kunnu verast fyriuttan til tess at verja fólk, ið bera brek, til fulnar, serliga tá ið vápnað stríð og fremmand hertøka er,

*Viðurkenna,* hvussu stóran týdning atkoma til sosiala, búskaparliga og mentanarliga umhvørvi, til heilsu og útbúgving, upplýsing og samskifti hevur, fyri at gera fólk, ið bera brek, før fyri at kunna gagnnýta øll mannarættindini og grundleggjandi frælsi til fulnar,

*Skilja,* at ein einstaklingur, sum hevur skyldur mótvegis øðrum einstaklingum og samfelagnum, sum hann ella hon hoyrir til, hevur skyldu at stremba eftir at framhevja og virka fyri teimum rættindum, sum altjóða mannarættindaskjalið viðurkennir,

*Eru sannførd* um, at familjan er natúrliga og grundleggjandi eindin í samfelagnum, og hon hevur krav um at verða vard av samfelagnum og landinum, og at fólk, ið bera brek og familjur teirra eiga at fáa neyðuga verju og hjálp til at gera sítt til, at fólk, ið bera brek til fulnar og á jøvnum føti við onnur kunnu brúka síni rættindini,

*Eru sannførd* um, at ein víðfevndur og integreraður altjóða sáttmáli, sum virkar fyri og verjir rættindi og virðing fyri fólki, ið bera brek, fer at hava stóran týdning til tess at bøta um djúptøknu sosialu vansarnar hjá fólki, ið bera brek, og fer at virka fyri teirra luttøku í borgaraligum, politiskum, sosialum og mentanarligum virksemi við líka møguleikum, bæði í menningarlondum og ídnaðarlondum,

*Eru komin á samt* um tað, ið niðanfyri stendur:

## Grein 1
## Endamál

Endamálið við hesum sáttmála er at fremja, verja og tryggja, at øll mannarættindi og grundleggjandi frælsi fult og javnbjóðis verða fólki, ið bera brek til gagns, og fremja virðingina fyri teirra viðføddu tign.

Hugtakið: “Fólk, ið bera brek” fevnir um fólk, sum hava varandi likamlig, sálarlig, vitborin ella kenslulig mein, tá ið hesi mein saman við ymsum avmarkingum kunnu forða fyri, at tey til fulnar og á virknan hátt kunnu vera við í samfelagnum á jøvnum føti við onnur.

## Grein 2
## Allýsingar

Í hesum sáttmála eru hesar allýsingar galdandi:

Hugtakið: ”Samskifti” fevnir um mál, tekstsýning, samskifti við punktskrift og nerting, stórstavaprent, atkomuligar margmiðlar, skrivligar og ljóðligar hættir, vanligt mál, tekstir, ið fólk lesa upp, snið, ið víkja frá og eru vaksin um, samskiftistól og samskiftishættir, sum eisini fevna um kunning, sum er til fals og samskiftistøkni,

Hugtakið: ”Mál” fevnir um talað mál, teknmál og onnur ikki-talað mál,

Hugtakið: ”Mismunur, grundaður á brek” fevnir um ein og hvønn mun, útihýsing ella avmarking grundað á brek, sum hevur til endamáls ella sum ávirkan at skaða ella gera til einkis ta

viðurkenning og nýtslu á jøvnum føti við onnur av øllum mannarættindum og grundleggjandi politiskum, búskaparligum, sosialum, mentanarligum, borgarligum ella øðrum frælsum. Hugtakið fevnir um allan mismun, eisini at fáa noktað rímiligar tillagingar,

Hugtakið: "Rímiligar tillagingar" fevnir um neyðugar og hóskandi broytingar og tillagingar, sum ikki leggja órímiliga stóra ella óneyðuga byrðu á, tá ið tað í ávísum førum er neyðugt fyri at tryggja fólki, ið bera brek, at fáa og njóta øll mannarættindi og grundleggjandi frælsi javnbjóðis øðrum,

Hugtakið: "Universelt snið" fevnir um snið á vørum, umhvørvi, skipanum og tænastum, sum øll fólk kunnu nýta mest møguligt uttan at hava tørv á tillaging og serskiltum sniði. "Universelt snið" skal ikki útihýsa hjálpartól til ávísar bólkar av fólki, ið bera brek, tá ið tørvur er á slíkum.

## Grein 3
## Aðalreglur

Aðalreglurnar í hesum sáttmála skulu verða:

*(a)* Virðing fyri íbornari tign, sjálvræði einstaklingsins, frælsi einstaklingsins at velja at vera óheftur av øðrum fólkum;

*(b)* Ikki fremja mismun;

*(c)* Fult og virkið at luttaka og verða partur av samfelagnum;

*(d)* Virðing fyri muni og góðtøka av fólki, ið bera brek, sum liður í fjølbroytni millum manna og mannatokka;

*(e)* Eins møguleikar;

*(f)* Atkoma;

*(g)* Javnstøða millum menn og kvinnur;

*(h)* Virðing fyri framvaksandi eginleikum hjá børnum, ið bera brek, og virðing fyri rættindum hjá børnum, ið bera brek til at varðveita sín samleika.

## Grein 4
## Almennar skyldur

1. Limalondini átaka sær at tryggja og fremja til fulnar øll mannarættindi og grundleggjandi frælsi fyri øll fólk, ið bera brek, uttan mismun av nøkrum slag grundað á brekið. Til hetta endamál, skulu limalondini:

    *(a)* Seta í gildi alla hóskandi lóggávu og fyrisitingarligar mannagongdir við meira, fyri at seta í verk tey rættindi, sum eru viðurkend í hesum sáttmála;

(b) Taka øll hóskandi stig, undir hesum tilevna lóggávu, fyri at broyta ella taka av verandi lógir, reglur, mannagongdir og siðvenju, sum gera mismun á fólki, ið bera brek;

(c) Hava í huga at verja og fremja mannarættindi hjá fólki, ið bera brek í øllum politikkum og skipanum;

(d) Halda seg frá einari og hvørjari gerð ella siðvenju, sum ikki samsvarar við henda sáttmála, og tryggja, at almennir myndugleikar og stovnar virka í samsvari við henda sáttmála;

(e) Taka øll hóskandi stig til at beina fyri mismuni, ið er grundaður á brek, sum ein og hvør einstaklingur, felagsskapur ella privat fyritøka fremur;

(f) Taka undir við ella stimbra gransking og menning av universelt sniðgivnum vørum, tænastum, útgerð og hentleikum, sum allýstar í grein 2 í hesum sáttmála, og sum skuldu kravt minst møguliga tillaging og minsta konstnað fyri at ganga tí ítøkiliga tørvinum hjá fólki, ið bera brek á møti, at styðja undir teirra atkomu og nýtslu, og styðja undir universelt snið, tá ið ein standard og vegleiðing verður ment;

(g) Taka undir við ella stimbra gransking og menning viðvíkjandi atkomu og nýtslu av nýggjari tøkni, eisini kunningar- og samskiftistøkni, flutningshjálpartólum, amboðum og hjálpartøkni, sum hóskar fólki, ið bera brek, raðfesta tøkni, ið ikki er ov kostnaðarmikil;

(h) Útvega neyðuga kunning til fólk, ið bera brek, um flutningshjálpartól, amboð og hjálpartøkni, eisini nýggja tøkni og aðra hjálp, stuðulstænastur og hentleikar;

(i) Styðja undir at upplæra yrkiskøn og starvsfólk, sum arbeiða við fólkum, ið bera brek, til at kenna tey rættindi, ið eru staðfest í hesum sáttmála, soleiðis at tey betur kunnu veita ta hjálp og tær tænastur, ið eru ásettar í sáttmálanum.

2. Viðvíkjandi búskaparligum, sosialum og mentanarligum rættindum, átekur hvørt limaland sær at seta tiltøk í verk í mun til mest møguligu orkuna í limalandinum, og, har tað er neyðugt, innan fyri karmarnar av altjóða samstarvi, við atliti til so við og við at seta øll hesi rættindi í gildi, uttan at vika við tær skyldur, sum eru ásettar í hesum sáttmála og sum eru beinleiðis galdandi í altjóða rætti.

3. Tá ið lóggáva og politiskar ætlanir, sum seta í verk henda sáttmála, verða tilevnaðar, og tá ið aðrar avgerðir verða tiknar, ið viðvíkja fólkum, ið bera brek, skulu limalondini leita sær ráð hjá fólki, ið bera brek, og taka tey aktivt upp í arbeiðið. Børn, ið bera brek, verða umboðaði gjøgnum teirra umboðandi felagsskapir.

4. Einki í hesum sáttmála skal ávirka tær ásetingar, sum eru í gildi í limalandinum, antin við lóg ella altjóða sáttmála, tá ið hesar ásetingar á ein betri hátt tryggja rættindini hjá fólki, ið bera brek. Eingin avmarking alla lítilsmeting av teimum mannarættindum og

grundleggjandi frælsum, sum eru viðurkend og galdandi í limalondunum sambært lóg, sáttmálum, reglum og siðvenju, skal finna stað við teirri undanførslu, at hesin sáttmálin ikki viðurkennir slík rættindi ella frælsi, ella at hesin sáttmáli viðurkennir slík rættindi ella frælsi í minni mun.

5. Ásetingarnar í hesum sáttmála skulu galda fyri allar partar av sambandsríkjum við ongum avmarkingum og ongum undantøkum

**Grein 5**
**Javnrættindi og eingin mismunur**

1. Limalondini viðurkenna, at øll fólk eru eins fyri og undir lógini og hava rætt til somu verju og sama gagn av lógini uttan mismun.

2. Limalondini skulu banna øllum mismuni, grundað á brek, og tryggja fólki, ið bera brek, javnbjóðis og effektiva lógarverju ímóti mismuni sama, hvør grundin er.

3. Til tess at fremja javnrættindi og beina fyri mismuni, skulu limalondini taka øll hóskandi stig at tryggja, at rímiligar tillagingar verða gjørdar.

4. Ávís átøk, sum eru neyðug fyri at skunda undir ella at fáa í lag javnrættindi í roynd og veru fyri fólk, ið bera brek, skulu ikki verða mett sum mismunur sambært ásetingunum í hesum sáttmála.

**Grein 6**
**Kvinnur, ið bera brek**

1. Limalondini viðurkenna, at kvinnur og gentur, ið bera brek, eru fyri nógvum mismuni, og í hesum sambandi skulu stig verða tikin at tryggja teimum fulla nýtslu - á jøvnum føti við onnur - til øll mannarættindi og grundleggjandi frælsi.

2. Limalondini skulu taka øll hóskandi stig til tess at tryggja til fulnar menning, framgongd og at geva kvinnum vald við tí endamáli at borga fyri, at tær kunnu fremja og njóta tey mannarættindi og grundleggjandi frælsi, sum eru ásett í hesum sáttmála.

**Grein 7**
**Børn, ið bera brek**

1. Limalondini skulu taka øll neyðug stig til tess at tryggja, at børn, ið bera brek, til fulnar kunnu njóta ágóðan av øll mannarættindum og grundleggjandi frælsi á jøvnum føti við onnur børn.

2. Í øllum avgerðum, ið viðvíkja børnum, ið bera brek, skal barnsins besta vera fremsta atlit.

3. Limalondini skulu tryggja, at børn, ið bera brek, hava rætt til at siga frá sínum áskoðanum ótarnað í øllum málum, sum viðvíkja teimum, at hóskandi dentur verður lagdur á teirra áskoðanir svarandi til aldur og búningarstig á jøvnum føti við onnur børn, og fyri at gera henda rætt til veruleika, fáa hóskandi stuðul í mun til brek og aldurstigið.

**Grein 8**
**Hugburðsbroyting**

1. Limalondini, fara undir at seta í verk tiltøk, sum eru munagóð, hóskilig og fara at virka beinanvegin:

   *(a)* Skapa hugburðsbroyting og meirvitan í øllum samfelagnum, eisini á familju-stigi, um fólk, ið bera brek, og at ala fram virðing fyri rættindum og tign hjá fólki, ið bera brek;

   *(b)* At niðurbróta vanamyndir, fordómar og skaðiliga siðvenju viðvíkjandi fólkum, ið bera brek, eisini tá ið hetta er grundað á kyn og aldur í øllum lívsins førum;

   *(c)* At økja um vitanina um førleikar og íkast frá fólki, ið bera brek.

2. Stig til tess at fremja hetta eru millum annað:

   *(a)* At seta í verk og varðveita munagóð almenn kunningarátøk fyri:

      (i) At læra fólk at virða rættindini hjá fólki, ið bera brek;

      (ii) At virka fyri jaligari fatan og størri samfelagsligari viðurkenning av fólkum, ið bera brek;

      (iii) At virka fyri at viðurkenna evni, virði og gávur hjá fólki, ið bera brek, og teirra íkast til arbeiðsplássi og arbeiðsmarknaðin;

   *(b)* At ala fram á øllum stigum í útbúgvingarskipanini, eisini í børnum frá ungum árum, ein hugburð við virðing fyri rættindum hjá fólki, ið bera brek;

   *(c)* Eggja øllum pørtum av fjølmiðlunum at mynda fólk, ið bera brek á ein hátt, sum er í samsvari við endamálið í hesum sáttmála;

   *(d)* At seta í verk hugburðsbroytandi átøk um fólk, ið bera brek og um rættindi hjá fólki, ið bera brek.

**Grein 9**
**Atkoma**

1. Fyri at fólk, ið bera brek, skulu kunna liva sjálvstøðugt og taka fullan lut í øllum lívsins viðurskiftum, skulu limalondini fremja hóskandi tiltøk fyri at tryggja fólki, ið bera brek, atkomu á sama støði sum onnur til bygningar og umhvørvi, til ferðamøguleikar, til upplýsing og samskifti, íroknað kunningar- og samskiftistøkni og skipanir, og til aðrar veitingar og tænastur, sum eru tøkar hjá ella verða veittar almenningi, bæði í bý og á bygd. Hesi tiltøk, sum skulu fevna um eyðmerking og burturbeining av forðingum og hindri fyri atkomu, skulu vera galdandi fyri m.a.:

   *(a)* Bygningar, vegir, samferðslu og aðrar innandura og uttandura veitingar, íroknað skúlar, hús, heilsuveitingar og arbeiðspláss;

   *(b)* upplýsing, samskifti og aðrar tænastur, íroknað tøkniligar tænastur og neyðtænastur.

2. Limalondini skulu eisini fremja hóskandi tiltøk fyri at:

   *(a)* menna, kunngera og hava eftirlit við at minstukrøv og vegleiðingar verða settar í gildi viðvíkjandi atkomu til veitingar og tænastur tøkar hjá og veittar almenningi;
   *(b)* tryggja at privatar eindir sum bjóða veitingar og tænastur, tøkar hjá og veittar almenningi, hava atlit fyri øllum viðvíkjandi atkomu hjá fólki, ið bera brek;
   *(c)* útvega ábyrgdarpersónum upplæring í atkomutrupulleikum hjá fólki, ið bera brek;
   *(d)* útvega skelti í Braille og í lættlesandi og lættskiljandi formi í bygningum og øðrum støðum, sum er opin fyri almenningi;
   *(e)* útvega ymiskar hjálparar og millumgongufólk, íroknað ferðaleiðarar, lesarar og teknmálstulkar til at lætta um atkomu til bygningar og onnur støð, sum eru opin fyri almenningi;
   *(f)* Styðja onnur hóskandi sløg av hjálp og stuðli til persónar, ið bera brek, til at tryggja teirra atkomu til upplýsingar;
   *(g)* Styðja atkomu fyri persónar, ið bera brek, til nýggja upplýsing og samskiftistøkni og skipanir, íroknað internet;
   *(h)* Styðja sniðgeving, menning, framleiðslu og útflýggjan av atkomuligari upplýsing og samskiftistøkni og skipanum tíðliga í tilgongdini, soleiðis at henda tøkni og hesar skipanir gerast atkomuligar fyri lægsta kostnað.

## Grein 10
## Rætt til lív

Limalondini vátta, at eitt og hvørt menniskja hevur natúrligan rætt til lív og vilja taka neyðug stig til at fólk, ið bera brek, fáa notið tað til fulnar á jøvnum føti við onnur.

## Grein 11
## Vandastøður og menniskjalig neyðstøða

Limalondini skulu, í samsvari við sínar skyldur sambært altjóða lóg, íroknað altjóða humaniterlóg og altjóða mannarættindalóg, taka øll neyðug stig til at tryggja

persónum, ið bera brek, verju og trygd í vandastøðum, harímillum støðum við vápnaðari ósemju, humaniterðum neyðarstøðum, og tá ið nattúruvanlukkur henda.

## Grein 12
## Líka fyri lóg

1. Limalondini vátta, at persónar, ið bera brek, hava rætt til viðurkenning alla staðni sum persónar fyri lógini.

2. Limalondini skulu ásanna, at persónar, ið bera brek, hava somu rættarstøðu á jøvnum føti við onnur í øllum lívsins viðurskiftum.

3. Limalondini skulu taka hóskandi stig at útvega persónum, ið bera brek, atkomu til tann stuðul, tey kunna hava tørv á, soleiðis at tey kunnu fáa ta rættarhjálp, tey hava brúk fyri.

4. Limalondini skulu – samsvarandi altjóða mannarættindalóg - tryggja, at øll stig, viðvíkjandi útinnan av rættarføri, eru hóskandi og munadygt tryggjað fyri at fyribyrgja misnýtslu. Tryggjast skal, at stig viðvíkjandi útinnan av rættarføri, virða rættindi, vilja og áhugamál hjá persóninum, ikki innibera egináhugamál og óhóskandi ávirkan, standa í mát við og eru snikkað til umstøðurnar hjá persóninum, krevja stytst møguliga tíð og verða regluliga endurskoðaðar av skikkaðum, uttanveltaðum og óheftum myndugleikum ella dómsvaldi. Trygdin skal standa í mát við ta ávirkan, sum slík stig hava á rættindi og áhugamál hjá persóninum.

5. Sambært ásetingnunum í hesi grein skulu limalondini, taka øll hóskandi og munadygg stig til at tryggja persónum, ið bera brek, rætt til - á jøvunum føti við onnur - at eiga ella arva ogn, at stýra sínum egnu fíggjarviðurskiftum og hava somu atkomu til bankalán, veðskuldarlán og annan fíggjarligan kreditt, og skulu tryggja, at persónar, ið bera brek, ikki tilvildarliga kunnu missa sínar ognir.

## Grein 13
## Atkomu til rættarskipanina

1. Limalondini skulu tryggja fólki, ið bera brek - á jøvnum føti við onnur - munadygga atkomu til rættarskipanina, eisini við at útvega rættarligar og aldurshóskandi hentleikar, við tí fyri eyga at lætta um teirra luttøku sum beinleiðis og óbeinleiðis partur, herundir sum vitni, í øllum rættarmálum, eisini á kanningarstigi og øðrum fyrireikandi stigum.

2. Til tess at tryggja fólki, ið bera brek, munadygga atkomu til rættarskipanina, skulu limalondini virka fyri hóskandi útbúgving til teirra, sum arbeiða í rættarskipanini, undir hesum løgreglu og fongsulsstarvsfólk.

## Grein 14
## Frælsi og trygdin hjá tí einstaka

1. Limalondini skulu tryggja, at persónar, ið bera brek á jøvnum føti við onnur:

*(a)* Hava rætt til persónligt frælsi og trygd;

*(b)* Verða ikki ólógliga og tilvildarliga frælsisskerd, og at einhvør skerjing av frælsi skal vera í samsvar við lóg, og at eitt brek í sær sjálvum skal í ongum føri rættvísgera frælsisskerjing.

2. Limalondini skulu tryggja, at um so er, at fólk, ið bera brek, verða frælsisskerd av onkrari grund, skulu tey - á jøvnum føti við onnur - hava rætt til trygd í samsvar við altjóða mannarættindi og skulu verða viðfarin í samsvar við endamál og meginreglur í hesum sáttmála, undir hesum við at fáa útvegað hóskandi innivist.

## Grein 15
## Frælsi frá píning ella miskunnarleysari, ómenniskjaligari ella niðrandi viðferð ella revsing

1. Eingin skal verða píndur ella miskunnarleyst, ómenniskjaliga ella niðrandi viðfarin ella revsaður. Serstakliga skal eingin uttan sítt fría samtykki vera fyri læknaligum ella vísindaligum royndum.

2. Limalondini skulu taka øll munadygg lóggávulig, fyrisitingarlig, rættarlig ella onnur stig til at forða fyri, at fólk, ið bera bek, verða pínd ella miskunnarleyst, ómenniskjaliga ella niðrandi viðfarin ella revsað.

## Grein 16
## Frælsi frá útnýttan, harðskapi og misnýtslu

1. Limalondini skulu taka øll hóskandi lóggávulig, fyrisitingarlig, sosial, undirvísingarlig og onnur stig til at verja fólk, ið bera brek, bæði í og uttanfyri heimið, móti øllum sløgum av útnýttan, harðskapi og misnýtslu, undir hesum kynsgrundaðum viðurskiftum.

2. Limalondini skulu eisini taka øll hóskandi stig til at forða øllum sløgum av útnýttan, harðskapi og misnýtslu við at tryggja millum annað hóskandi sløg av kyns- og aldursstýrdari ráðgeving og stuðli til fólk, ið bera brek, og teirra avvvarðandi og hjálparar, eisini við at útvega upplýsing og undirvísing um, hvussu ein sleppur undan, varnast og ger vart við tilburðir við útnýttan, harðskapi og misnýtslu. Limalondini skulu tryggja, at verjutiltøkini hava atlit fyri aldri, kyni og førleika.

3. Til tess at forða fyri tilburðum av øllum sløgum av útnýttan, harðskapi og misnýtslu skulu limalondini tryggja, at allir hentleikar og stovnar ætlaðir at veita fólki, ið bera brek, tænastur, eru undir munadyggum eftirliti av óheftum myndugleikum.

4. Limalondini skulu taka øll hóskandi stig til at fremja likamligan, kognitivan og sálarligan bata, endurmenning og sosiala tillaging av fólki, ið bera brek, sum gerast offur fyri einumhvørjum slag av útnýttan, harðskapi ella misnýtslu, eisini við at útvega verjutænastur. Slíkur bati og endurmenning skal fara fram í umhvørvi, sum elur heilsu, vælferð, sjálvsvirðing, tign og persónligt frælsi hjá persóninum og tekur atlit til serligan tørv vegna kyn og aldur.

5. Limalondini skulu seta í gildi munadygga lóggávu og mannagongdir, herundir lóggávu og mannagongdir viðvíkjandi kvinnum og børnum, til at tryggja, at tilburðir við útnýttan, harðskapi og misnýtslu mótvegis fólki, ið bera brek, verða sæddir, kannaðir og um neyðugt drignir fyri rættin.

## Grein 17
## Verja integritetin hjá tí einstaka

Ein og hvør, ið ber brek, hevur rætt til virðing fyri sínum likamliga og sálarliga integriteti á jøvnum føti við onnur.

## Grein 18
## Frælsi til at flyta seg og til tjóðskap

1. Limalondini skulu viðurkenna rættin hjá fólki, ið bera brek, til frælsi til at flyta seg, til frælsi at velja sær bústað og til tjóðskap á jøvnum føti við onnur, eisini við at tryggja, at fólk, ið bera brek:

    *(a)* Hava rætt til at ogna sær og skifta tjóðskap, og teimum skal ikki verða noktaður tjóðskapur tilvildarliga ella vegna teirra brek.

    *(b)* Verða ikki, vegna teirra brek, noktað teirra møguleika til at ogna sær, eiga og gera nýtslu av teirra tjóðskaparprógvi og øðrum samleikaprógvum, ella at gera nýtslu av viðkomandi mannagongdum, sum t.d. innflytingarmannagongd, sum kunna vera neyðugar til at lætta um, tá ið ein skal gera nýtslu av sínum frælsi at flyta.

    *(c)* Kunna fara frítt úr einum og hvørjum landi, eisini sínum egna.

    *(d)* Verða ikki noktað, tilvildarliga ella vegna teirra brek, rættin til at koma inn í sítt egna land.

2. Børn, ið bera brek, skulu skrásetast beint eftir føðing og skulu hava rætt til navn beint eftir føðing, hava rætt til at ogna sær tjóðskap, og rætt til at kenna síni foreldur og vaksa upp hjá teimum, um tað er møguligt.

## Grein 19
## At liva sjálvstøðugt og vera partur av samfelagnum

1. Limalondini viðurkenna rættin hjá øllum fólkum, ið bera brek, at liva í samfelagnum við møguleikum á jøvnum føti við onnur, og limalondini skulu taka munadygg og hóskandi stig til at lætta um hjá fólki, ið bera brek, at njóta henda rætt til fulnar, og til teirra fullu íroknan og luttøku í samfelagnum, eisini við at tryggja at:
   *(a)* Fólk, ið bera brek, hava møguleika at velja sær bústað og velja hvar og saman við hvørjum, tey vilja liva - á jøvnum føti við onnur, og at tey ikki skulu vera noydd at liva í serligum búplássum;
   *(b)* Fólk, ið bera brek, hava atkomu til eina røð av heimatænastu, stovnstænastu og aðrari samfelagsstuðulstænastu, harímillum persónliga hjálp til at stuðla upp undir gerandislív og luttøku í samfelagnum, og fyri at forða fyri avbyrging og sundurskiljing frá samfelagnum;
   *(c)* Samfelagsligar tænastur og veitingar til almenning sum heild eru tøkar á jøvnum føti hjá fólki, ið bera brek, og eru lagað til teirra tørv.

## Grein 20
## Persónligt flytføri

1. Limalondini skulu taka munadygg stig til at tryggja persónligt flytføri við størst møguligum sjálvbjargni hjá fólki, ið bera brek, eisini við:

   *(a)* At lætta um flytføri hjá fólki, ið bera brek, á tann hátt og til ta tíð, tey ynskja og fyri rímiligan kostnað;
   *(b)* At lætta um atkomu hjá fólki, ið bera brek, til góð flutningshjálpartól, amboð, hjálpartøkni og ymsar hjálparpersónar og millumgongufólk, eisini við at bjóða slíkt fyri rímiligan kostnað;
   *(c)* Útvega fólki, ið bera brek, og serútbúnum starvsfólki, sum arbeiða við fólki, ið bera brek, upplæring í flytførisdugnaskapi;
   *(d)* Eggja framleiðarum av flutningshjálpartólum, amboðum og hjálpartøkni at taka atlit til øll viðurskifti viðvíkjandi í flytføri hjá fólki, ið bera brek.

## Grein 21
## Framsøgufrælsi og atkomu til upplýsingar

1. Limalondini, skulu taka øll hóskandi stig til at tryggja, at fólk, ið bera brek, fáa gjørt nýtslu av sínum rætti til framsøgufrælsi, undir hesum, frælsi at leita upp, taka ímóti og lata frá sær upplýsingar og hugskot á jøvnum føti við onnur við nýtslu av øllum sløgum av sjálvvaldum samskifti, sambært ásetingunum í grein 2 hesum sáttmála, eisini við at:

   *(a)* Útvega fólki, ið bera brek, almennar upplýsingar í atkomiligum sniði og við tøkni hóskandi til ymisk sløg av breki í góðari tíð og fyri sama prís;
   *(b)* Góðtaka og gera tað léttari at nýta teknmál, Braille, størrandi og alternativt samskifti og øll onnur sløg av samskifti, sum eru tøk til fólk, ið bera brek í almennum samskifti sambært teirra ynskjum;

(c) Sannføra privatar fyritøkur, ið útvega almennar tænastur, eisini um internetið, at útvega fólki, ið bera brek, upplýsingar og tænastur í atkomuligum og nýtiligum sniði;
(d) Eggja fjølmiðlum, harímillum teimum, sum veita upplýsing um internetið, at gera sínar tænastur atkomuligar fyri fólk, ið bera brek;
(e) Viðurkenna og menna brúkið av teknmáli.

## Grein 22
## Virðing fyri privatlívinum

1. Einki fólk, ið ber brek - uttan mun til bústað ella liviumstøður - skal vera fyri tilvildarligari ella ólógligari uppíblanding í hansara ella hennara privatlív, familju, heim ella brævaskifti ella onnur sløg av samskifti ella fyri ólógligum álopum á hansara ella hennara heiður og æru. Fólk, ið bera brek, hava rætt til lógarverju móti slíkari uppíblanding og slíkum álopum.

2. Limalondini, skulu verja rættin at dylja persónligar-, heilsuligar- og endurmenningar-upplýsingar hjá fólki, ið bera brek, á jøvnum føti við onnur.

## Grein 23
## Virðing fyri heimi og familju

1. Limalondini skulu taka munadygg og hóskandi stig til at beina burtur mismun móti fólki, ið bera brek í øllum viðurskiftum, sum viðvíkja giftarmáli, familju, foreldraskapi og persónligum sambandi á jøvnum føti við onnur fyri at tryggja:

   (a) Viðurkenning av rættinum hjá øllum giftingarførum fólkum, ið bera brek, til at gifta seg og stovna familju byggjandi á frælst og fult samtykki frá báðum framtíðarhjúnafeløgunum.

   (b) Viðurkenning av rættinum hjá fólki, ið ber brek, til at avgera frítt og við ábyrgd hvussu nógv børn tey ynskja sær, og hvussu tøtt hesi skulu vera, og at hava atkomu til aldursrætta upplýsing, undirvísing í nøring og barnaavmarking, og at tey amboð, sum eru neyðug til tess at tey kunna nýta henda rætt verða útvegað.

   (c) At fólk, ið bera brek, harímillum børn, varðveita sítt fruktabæri á jøvnum føti við onnur.

2. Limalondini skulu tryggja tey rættindi og tær skyldur, sum fólk, ið bera brek, hava viðvíkjandi verjumálum, ómyndingum, ættleiðing av børnum ella líknandi, tá ið hesi hugtøk finnast í tjóðarlógum; í øllum førum skulu atlitini til barnsins besta vera týdningarmest. Limalondini skulu veita hóskandi stuðul til fólk, ið bera brek, tá ið tey skulu útinna sínar skyldur sum barnauppalarar.

3. Limalondini skulu tryggja børnum, ið bera brek, javnrættindi viðvíkjandi familjulívi. Við tí í huga at fremja hesi rættindi og til tess at fyrbyrgja dyljing, eftirlatan, vanrøkt og

avbyrging av børnum, ið bera brek, skulu limalondini veita børnum, ið bera brek, og teirra avvarðandi skjóta og umfatandi upplýsing, tænastur og stuðul.

4. Limalondini skulu tryggja, at eitt barn ikki skal verða tikið frá sínum foreldrum ímóti sínum vilja, uttan so at skikkaðir myndugleikar, sum eru undir dómseftirliti gera av, í samsvar við galdandi lóg og fyriskipanir, at slík sundurskiljing er til barnsins besta. Í ongum føri skal eitt barn verða tikið frá foreldrunum vegna brek antin hjá barninum ella øðrum ella báðum foreldrunum.

5. Limalondini skulu í teimum førum, tá ið næstu skyldfólk ikki eru før fyri at taka sær av barni, ið ber brek, gera sítt ítarsta til at útvega røkt hjá skyldfólki, og um tað ikki ber til, í familju aðrastaðni í nærsamfelagnum.

## Grein 24
## Útbúgving

1. Limalondini viðurkenna rættin hjá fólki, ið bera brek, til útbúgving. Við tí fyri eyga at fremja henda rætt uttan mismun og byggjandi á javnbjóðis møguleikar, skulu limalondini tryggja eina breiða útbúgvingarskipan á øllum stigum og læring fyri lívið, sum miðar ímóti:

   *(a)* Fullkomnari menning av menniskjaligum møguleikum og ærukenslu og sjálvsvirðing, og at styrkja virðingina fyri mannarættindum, grundleggjandi frælsi og menniskjaligum fjølbroytni;

   *(b)* At menna fólk, ið bera brek, teirra persónsmensku, gávur og skapandi evni, eins og teirra andaligu og likamligu førleikar so nógv sum gjørligt.

   *(c)* At gera fólk, ið bera brek, før fyri at taka munadyggan lut í einum frælsum samfelag.

2. Til at fremja hendan rætt skulu limalondini tryggja at:

   *(d)* Fólk, ið bera brek, verða ikki útihýst úr tí almennu útbúgvingarskipanini vegna sítt brek, og at børn, ið bera brek, verða ikki útihýst úr ókeypis og kravdum barnaskúla ella framhaldsskúla vegna brek.

   *(e)* Fólk, ið bera brek, hava atkomu til ein breiðan, dygdargóðan og ókeypis barnaskúla og framhaldsskúla á jøvnum føti við onnur í samfelagnum, har tey búgva.

   *(f)* Rímiligar umstøður verða veittar eftir einstaklings tørvi.

   *(g)* Fólk, ið bera brek, fáa neyðugan stuðul innanvert almennu skúlaskipanina til tess at fremja dygdargóða útbúgving.

(h) Dygdargóð persónlig stuðulstiltøk verða sett í verk í umhvørvum, sum á bestan hátt tryggja fakliga og sosiala menning í samsvar við endamálið, sum er heil luttøka.

3. Limalondini skulu gera fólk, ið bera brek, før fyri at fáa lívs- og sosialar menningarførleikar til at fremja teirra heilu og javnbjóðis luttøku í útbúgving og sum samfelagsborgarar. Til at røkka hesum máli skulu limalondini taka hóskandi stig, harímillum:

   (a) Lætta um læring í Braille, alternativari skrift, alternativum arbeiðsháttum, miðlum og sniði til samskifti og kunning og flytførisdugnaskap, og fremja stuðul frá javnlíkum og vegleiðing;

   (b) Lætta um læring í teknmáli og stimbra málsligan samleika millum tey deyvu.

   (c) Tryggja at útbúgving av fólki, og serstakliga børnum, sum eru blind, deyv ella deyvblind verður framd við mest hóskandi málum og samskiftisháttum og – miðlum fyri tann einstaka og í umhvørvum, sum á bestan hátt tryggja fakliga og sosiala menning.

4. Til tess at hjálpa til at tryggja, at hesi rættindi verða framd í verki skulu limalondini taka hóskandi stig til at seta lærarar í starv, harímillum lærarar, sum bera brek, sum hava útbúgving í teknmáli og/ella Braille, og at útbúgva serfrøðingar og starvsfólk sum arbeiða á øllum skúlastigum. Slík útbúgving skal gera starvsfólkini tilvitað um brek og læra tey at brúka hóskandi hjálpartól og alternativan arbeiðshátt, miðlar og snið í samskifti, frálæringarhátti og tilfari sum stuðul til fólk, ið bera brek.

5. Limalondini skulu tryggja, at fólk, ið bera brek, fáa høvi til at stunda hægri lestur, vinnuútbúgving, vaksnamannaútbúgving og læring fyri lívið uttan mismun og á jøvnum føti við onnur. Til at røkka hesum endamáli skulu limalondini tryggja, at rímiligar umstøður verða veittar fólki, ið bera brek.

## Grein 25
## Heilsa

1. Limalondini ásanna, at fólk, ið bera brek, hava rætt til at njóta best møguliga heilsustøði uttan mismun vegna brek. Limalondini skulu taka øll hóskandi stig til at tryggja fólki, ið bera brek, atkomu til heilsutænastur, sum eru bundnar at kyni, harímillum heilsuliga endurmenning. Serstakliga skulu limalondini:

   (a) Útvega fólki, ið bera brek, sama útboð, góðsku og støði av ókeypis ella ódýrari heilsurøkt og heilsuskipanum, sum verða veittar øðrum fólkum, eisini skipanir viðvíkjandi kynslívi og nøring og almennar heilsutænastuskipanir fyri alt fólkið;

   (b) Útvega tær heilsutænastur, sum eru neyðugar fyri fólk, ið bera brek, júst vegna teirra brek, harímillum skjóta, viðkomandi sjúkugreining og viðgerð,

og tænastur ætlaðar til at minka um og forða fyri fleiri brekum, eisini millum børn og gomul fólk;

*(c)* Útvega hesar heilsutænastur so nær við bústaðin hjá fólkinum sjálvum, undir hesum á bygd;

*(d)* Krevja at heilsustarvsfólk útvega røkt á sama støði til fólk, ið bera brek, sum til onnur, herundir, við støði í fríum og upplýstum samtykki, m.a. økja um vitanina um mannarættindi, virðing, sjálvstøðu og tørv hjá fólki, ið bera brek, gjøgnum læru og útbreiðslu av etiskum støði fyri almenna og privata heilsurøkt.

*(e)* Bannað mismuni mótvegis fólki, ið ber brek, viðvíkjandi veiting av heilsutrygging og lívstrygging, har ið slík trygging er loyvd í tjóðarlóg, sum skal veitast á skynsaman og skilagóðan hátt.

*(f)* Forða fyri at heilsurøkt ella heilsutænasta ella matur og drekka verða noktað vegna brek, og mismunur soleiðis gjørdur.

**Grein 26**
**menning og endurmenning**

1. Limalondini skulu taka munadygg og hóskandi stig, herundir stuðul frá javnlíkum, til tess at gera fólk, ið bera brek, før fyri at vinna sær og varðveita størst møguligt sjálvræði, fullan likamligan, sálarligan og vinnuligan førleika og fullan part og luttøku í øllum lívsins viðurskiftum. Til at røkka hesum máli skulu limalondini skipa, styrkja og víðkað umfatandi menningar- og endurmenningartænastur og skipanir, serstakliga á heilsu-, starvs- útbúgvingar- og almannaøkinum á slíkan hátt, at hesar tænastur og skipanir, sum:

   *(a)* Byrja so tíðliga sum gjørligt og byggja á tvørfakliga meting av persónligum tørvi og styrki.

   *(b)* Stuðla undir sjálvbodna og tøka luttøku og íroknan í samfelagið og øllum lívsins viðurskiftum hjá fólkum, ið bera brek, so nær við bústaðin hjá fólkinum sjálvum, herundir á bygd.

2. Limalondini skulu stimbra menning av byrjanarútbúgving og framhaldsútbúgving fyri serfrøðingar og starvsfólk, sum arbeiða í menningar- og endurmenningartænastum.

3. Limalondini skulu stimbra (availability), vitan og nýtslu av hjálpartólum og tøkni, sniðgivin til fólk, ið bera brek, tá ið tey verða nýtt til menning og endurmenning.

**Grein 27**
**Arbeiði og starvssetan**

1. Limalondini viðurkenna rættin hjá fólki, ið bera brek, til at arbeiða á jøvnum føti við onnur; hetta inniber eisini rættin til at vinna til lívsins uppihald við einum arbeiði, valt av fríum vilja ella góðtikið á arbeiðsmarknað og arbeiðsumhvørvi, sum er opið, sum roknar uppí og gevur atkomu til fólk, ið bera brek. Limalondini skulu verja og virka fyri, at rætturin til arbeiði verður framdur, eisini hjá teimum, sum gerast brekað í sínum arbeiði, við at taka hóskandi stig, eisini gjøgnum lóggávu, til at, inter alia:
2.
   *(a)* Verja rættin hjá fólki, ið bera brek, til - á jøvnum føti við onnur – rættvís og gagnlig arbeiðsviðurskifti, harímillum javnbjóðis møguleikar og somu løn fyri arbeiði við sama virði, trygg og heilsugóð arbeiðsviðurskifti, harímillum verju ímóti happing og uppreisn fyri vanbýti;

   *(b)* Tryggja, at fólk, ið bera brek, eru før fyri at gagnnýta síni arbeiðs- og fakfelagsrættindi á jøvnum føti við onnur;

   *(c)* Geva fólki, ið bera brek, møguleika fyri at hava veruliga atkomu til almenna tøkniliga og vinnuliga lærlingaútbúgving, starvsvenjingartilboð og vinnu- og framhaldsútbúgving;

   *(d)* Virka fyri starvsmøguleikum og framflytan í arbeiði fyri fólk, ið bera brek, á arbeiðsmarknaðinum, eins og stimbra til at finna, útvega sær, halda fast um og venda aftur til arbeiði;

   *(e)* Virka fyri møguleikum til egið virksemi, ígongdsetaravirksemi, menning av samvinnufeløgum og byrjan av eginvirki;

   *(f)* Seta fólk, ið bera brek, í alment starv;

   *(g)* Virka fyri at fólk, ið bera brek, verða sett í starv í privatum virkjum gjøgnum hóskandi politisk stig og tiltøk, sum kunnu fevna um skipaðan jaligan mismun, eggjan, og onnur tiltøk;

   *(h)* Tryggja at hampuligar umstøður verða veittar fólki, ið bera brek, á arbeiðsplássinum;

   *(i)* Virka fyri at fólk, ið bera brek, fáa royndir á tí opna arbeiðsmarknaðinum;

   *(j)* Virka fyri at fólk, ið bera brek, fáa endurmenning í síni vinnu ella yrki, fáa varðveitt sítt arbeiði og fáa skeið til tess at kunna sleppa aftur í arbeiði;

3. Limalondini skulu tryggja, at fólk, ið bera brek, ikki verða hildin í trældómi ella í ófrælsi og verða vard á jøvnum føti við onnur, ímóti tvingsilsarbeiði.

## Grein 28
## Nøktandi lívskor og almannavernd

1. Limalondini viðurkenna, at fólk, ið bera brek, hava rætt til nøktandi lívskor, bæði tey sjálvi og familjur teirra, hetta fevnir eisini um at hava nóg mikið av mati, klæðum og nóg góðan bústað og rætt til støðugt bøtt lívskor, og limalondini skulu taka hóskandi stig til at tryggja og virka fyri, at hesin rættur verður framdur, uttan mismun vegna brek.

2. Limalondini viðurkenna, at fólk, ið bera brek, hava rætt til almannavernd og til at njóta hendan rættin, uttan mismun vegna brek, og limalondini skulu taka hóskandi stig til at tryggja og virka fyri, at hesin rættur verður framdur – undir hesum:

    *(a)* Tryggja, at fólk, ið bera brek, sleppa eins væl fram at reinum vatni, sum onnur, og tryggja, at fólk, ið bera brek, sleppa fram at hóskandi sertænastum, sertólum og aðrari serhjálp, til ein rímiligan kostnað;

    *(b)* Tryggja, fólkum, ið bera brek, serliga kvinnum, gentum og gomlum fólki, ið bera brek, atkomu til stovnar og skipanir, ið umsita almannavernd og avmarka fátækradømi;

    *(c)* Tryggja, at fólk, ið bera brek, og familjur teirra, sum liva í fátækradømi, fáa stuðul frá landinum til útreiðslur, sum eru tengdar at brekinum, herundir hóskandi venjing, ráðgeving, fíggjarligan stuðul og hvíldarrøkt;

    *(d)* Tryggja, fólki, ið bera brek, atkomu til í almennar bústaðarbyggingar;

    *(e)* Tryggja, fólki, ið bera brek, atkomu til eftirlønarveitingar- og skipanir á jøvnum føti við onnur.

## Grein 29
## Luttøka í politiskum og almennum lívi

1. Limalondini skulu tryggja fólki, ið bera brek, politisk rættindi og møguleika til at njóta hesi rættindi á jøvnum føti við onnur, og skulu binda seg til, at:

    *(a)* Tryggja, at fólk, ið bera brek, fult og heilt fáa tikið lut í politiskum og almennum lívi á jøvnum føti við onnur, beinleiðis ella umvegis teirra umboð, undir hesum liggur rætturin og møguleikin hjá fólki, ið bera brek, at velja og verða vald, millum annað soleiðis:

        *(i)* Tryggja at val-mannagongdir, hentleikar og tilfar eru hóskandi, atkomulig og løtt at skilja og nýta;

        *(ii)* Verja rættin hjá fólki, ið bera brek, til loyniliga atkvøðugreiðslu á vali og á almennum fólkaatkvøðum, uttan at tey skulu føla seg hótt, og rættin til at stilla upp, til munadygt at taka við politiskum sessi og røkja allar almennar uppgávur á øllum stjórnarstigum, tá skal síggjast til, at har, ið tørvur er á tí, verður lætt um, tá ið hjálpartøkni og nýggj tøkni skal nýtast;

*(iii)* Tryggja, at fólk, ið bera brek, sum veljarar, frítt kunnu úttrykkja sín vilja, og tá ið tað er neyðugt, um tey biða um tað, loyva einum persóni, sum tey sjálvi hava valt, at hjálpa teimum at velja;

*(b)* Aktivt stimbra einum umhvørvi, har ið fólk, ið bera brek, fult og heilt kunnu taka lut í samfelagsligum viðurskiftum, uttan mismun og á jøvnum føti við onnur, og eggja teimum til at taka lut í almennum málum, undir hesum:

*(i)* Luttaka í ikki-stjórnarligum felagsskapum og felagsskapum, sum hava við almenna og politiska lív landsins at gera, og í virkseminum og umsitingini hjá politiskum flokkum;

*(ii)* At stovna og fara upp í felagsskapir við fólki, ið bera brek, fyri at umboða tey í altjóða- og innlendis høpi, í økjum og á sjálvum staðnum.

## Grein 30
## Luttøka í mentanarlívi, frítíðar-, stuttleika- og ítróttarvirksemi

1. Limalondini viðurkenna rættindini hjá fólki, ið bera brek, til á jøvnum føti við onnur at taka lut í mentanarlívi, og tey skulu taka øll hóskandi stig til tess at tryggja, at fólk, ið bera brek:

   *(a)* Fáa atkomu til mentanarligt tilfar í atkomiligum formi;

   *(b)* Fáa atkomu til sjónavarpssendingar, film, sjónleik og onnur mentanarligum tiltøk undir atkomiligum karmum;

   *(c)* Fáa atkomu til støð, har ið mentanarligar framførslur og tænastur eru, so sum leikhús, søvn, biohallir, bókasøvn og ferðamannatænastur, og so vítt møguligt fáa atkomu til minnisvarðar og onnur støð, sum hava tjóðarmentanarligan týdning.

2. Limalondini skulu taka hóskandi stig til, at fólk, ið bera brek, skulu hava møguleika at menna og nýta síni skapandi, listaligu og vitbornu evni, ikki bara fyri sína egnu skyld, men eisini fyri at ríka samfelagið.

3. Limalondini skulu taka øll hóskandi stig til sambært altjóða lóg at tryggja, at lógir, sum verja vitborin ognarættindi, ikki órímiliga og vegna mismun forða fyri, at fólk, ið bera brek, sleppa fram at mentanarligum tilfari.

4. Fólk, ið bera brek, skulu – á jøvnum føti við onnur – hava rætt til at verða viðurkend og stuðlað í sínum serliga mentanarliga og málsliga samleika, herundir teknmáli og deyvamentan.

5. Við tí í hyggju at gera fólk, ið bera brek, før fyri at luttaka á jøvnum føti við onnur í frítíðar-, stuttleika- og ítróttartiltøkum, skulu limalondini taka hóskandi stig til at:

   *(a)* Geva fólki, ið bera brek, áræði til og virka fyri, at tey, í so stóran mun sum til ber, taka lut í øllum vanligum ítróttargreinum á øllum stigum;

   *(b)* Tryggja at fólk, ið bera brek, hava møguleika at skipa seg, mennast og taka lut í serligum ítróttar- og frítíðarvirksemi fyri brekað, og við hesum fyri eyga hjálpa til - á jøvnum føti við onnur - at útvega hóskandi vegleiðing, venjing og fígging;

   *(c)* Tryggja at fólk, ið bera brek, fáa atkomu til ítróttar-, frítíðar- og ferðamannastøð;

   *(d)* Tryggja at børn, ið bera brek, hava atkomumøguleikar á jøvnum føti við onnur børn til at vera uppi í spæli, frítíðar-, stuttleika- og ítróttarvirksemi, herundir virksemi innan skúlaskipanina;

   *(e)* Tryggja at fólk, ið bera brek, hava atkomu til tænastur frá teimum, sum skipa fyri frítíðar-, ferðamanna-, stuttleika- og ítróttarvirksemi.

## Grein 31
## Hagtals- og dátuinnsavning

1. Limalondini átaka sær at savna hóskandi upplýsingar, íroknað hagtals- og granskingartilfar, sum ger tey før fyri at orða og seta í gildi reglur, ið implementera henda sáttmála. Tá ið hesar upplýsingar verða savnaðar og goymdar, skal

   *(a)* tryggjast, at hetta verður gjørt sambært galdandi lóggávu, íroknað lóggávuni um dátuverju, hetta til tess at tryggja, at tagnarskylda verður hildin, og at privatlívið hjá fólki, ið bera brek, verður virt;
   *(b)* tryggjast, at hetta verður gjørt sambært altjóða góðtiknum mannagongdum, til tess at verja mannarættindi, grundleggjandi frælsi og etiskar meginreglur, tá ið hagtøl verða savnað og nýtt.

2. Upplýsingarnar, sum verða savnaðar sambært hesari grein, skulu skiljast sundur eftir tørvi, og nýtast til at hjálpa limalondunum við at áseta tær skyldurnar, sum tey eiga at seta í gildi sambært hesum sáttmála, og til at eyðmerkja og betra um tær forðingarnar, sum fólk, ið bera brek, renna seg í, tá ið tey útinna síni rættindi.

3. Limalondini hava ábyrgdina av útbreiðslu av hesum hagtølum og tryggja fólkum, ið bera brek og øðrum atkomu til tey.

## Grein 32
## Altjóða samstarv

1. Limalondini viðurkenna, hvussu týdningarmikið altjóða samstarv er, og at altjóða samstarv verður framhevja, fyri at stuðla limalondunum í teirra royndum at seta í verk tey mál og mið, ið ásett eru í hesum sáttmála, og limalondini fara at taka hóskandi og munagóð stig hesum viðvíkjandi millum lond og - sum tørvur er á tí - saman við avvarðandi altjóða- og økisfelagsskapum og borgarafeløgum, serliga feløgum hjá fólki, ið bera brek. Slík stig kundu millum annað verið:

   *(a)* Tryggja, at fólk, ið bera brek, eru uppií og sleppa fram at altjóða samstarvi, íroknað altjóða menningarátøkum;
   *(b)* Lætta um og stuðla førleikamenning, íroknað at skifta upplýsingar, royndir, upplæringarskipanir og frægastu royndirnar sínámillum og vera saman um hesi;
   *(c)* Lætta um granskingarsamstarv og atkomu til vísindaliga og tøkniliga vitan;
   *(d)* Eftir tørvi útvega tøkniligan og fíggjarligan stuðul, herundir at lætta um atkomu til og vera saman um tøka og stuðlandi tøkni og at flyta tøknifrøði sínámillum.

2. Ásetingarnar í hesi grein, minka ikki um tær skyldur, ið hvørt limaland hevur sambært hesum sáttmála.

## Grein 33
## Innlendis ígildisetan og eftirlit

1. Alt eftir hvussu tey eru skipað, skulu limalondini upprættað eina ella fleiri miðsavnandi eindir í miðfyrisitingini, tá ið ásetingarnar í hesum sáttmála skulu setast í gildi í innlendis lóggávu og tey eiga at geva tí hóskandi ans at fáa í lag og skipa fyri samskipandi eindum í miðfyrisitingini fyri at lætta um líknandi tiltøk á teimum ymisku málsøkinum og á ymiskum stigum.

2. Limalondini skulu samsvarandi løgligu og umsitingarligu skipan teirra styrkja, tilnevna og grunda karmar innlendis, eisini eina ella – eftir tørvi – fleiri sjálvstøðugar eindir, sum kunnu virka fyri, verja og hava eftirlit við, at ásetingarnar í hesum sáttmála verða settar í gildi í innlendis lóggávu. Tá ið limalondini tilnevna og grunda tílíkar eindir, skulu tey hava tær meginreglurnar í huga, sum fevna um, hvussu landsstovnar, ið verja og fremja mannarættindi, virka, og hvussu støða teirra er.

3. Samfelagið sum heild og serliga fólk, ið bera brek og tey feløg, ið umboða tey, skulu verða tengd at og taka fullan lut í eftirlitsgongdini.

## Grein 34
## Nevnd at røkja rættindini hjá fólki, ið bera brek

1. Setast skal á stovn ein nevnd at røkja rættindini hjá fólki, ið bera brek, (niðanfyri nevnd “nevndin”), ið skal fremja tær niðanfyrinevndu skyldur.

2. Tá ið hesin sáttmáli kemur í gildi, skulu tólv serfrøðingar manna nevndina. Eftir at seksti fleiri lond hava staðfest ella samtykt sáttmálan, skal nevndarlimatalið økjast við seks limum, so komið verður upp á í mesta lagi átjan limir.

3. Nevndarlimirnir skulu nýta sín persónliga førleika, og teir skulu vera fólk á høgum moralskum stigi, hvørs málsræði og royndir á tí økinum, sum hesin sáttmáli fevnir um, eru viðurkend. Tá ið limalondini tilnevna evni til nevndarlimir, verður heitt á tey um at geva ásetingunum í grein 4, stk. 3 í hesum sáttmála hóskiligan ans.

4. Limalondini velja nevndarlimirnar og skulu ansa eftir, at teir eru úr rímiliga nógvum pørtum av heiminum, umboða ymiska mentan og ymiskar lógarskipanir, at javnt er býtt millum kynini, og at serfrøðingar við breki taka lut.

5. Nevndarlimirnir skulu veljast við loyniligari atkvøðu av einum lista við fólki, sum limalondini hava tilnevnt burtur úr tjóðarumboðum sínum á fundum á limalandaráðstevnuni. Á hesum fundum, har ið tveir triðingar av limalondunum skulu mynda viðtøkuføri, skulu tey fólk, ið verða vald í nevndina, vera tey, ið fáa hægsta atkvøðutalið og avgjørdan meiriluta av atkvøðunum frá teimum umboðunum fyri limalondini, ið eru hjá og sum atkvøða.

6. Fyrsta valið skal vera ikki meiri enn seks mánaðir eftir tann dag, tá ið hesin sáttmáli kemur í gildi. Í minsta lagi fýra mánaðir fyri hvønn valdag skal aðalskrivarin í Sameindu Tjóðum skriva bræv til limalondini og heita á tey um at senda tilnevningarnar innan tveir mánaðir. Síðani skal aðalskrivarin gera lista í bókstavarøð av øllum teimum, sum á henda hátt eru tilnevnd, sum ger kunnugt, hvørji av limalondunum hava tilnevnt tey, og hann skal senda listan til limalondini

7. Nevndarlimirnir verða valdir til eitt fýra-ára skeið. Teir kunnu veljast aftur eina ferð. Men hjá seks av limunum, ið eru valdir á fyrsta valinum, skal valskeiðið enda eftir tveimum árum; beint eftir fyrsta valið verða nøvnini á hesum seks limunum vald við lutakasti, sum fundarstjóranum, ið víst verður til í stykki 5 í hesi grein, stendur fyri.

8. Teir seks nevndarlimirnir, ið skulu veljast afturat, verða valdir, tá ið vanligt val er, sambært avvarðandi ásetingum í hesi grein.

9. Um nevndarlimur doyr ella fer frá ella kunnger, at hann av onkrari orsøk ikki longur fær røkt skyldur sínar, skal tað limaland, sum tilnevndi limin, útnevna annan serfrøðing við somu førleikum, sum lýkur tey krøv, ið eru ásett í avvarðandi ásetingum í hesi grein, at sita tað, sum eftir er av valskeiðnum.

10. Nevndin ger sjálv reglurnar fyri arbeiðsháttin

11. Aðalskrivarin í Sameindu Tjóðum sær til, at tann manning og teir hentleikar eru tøkir, ið skulu til, skal nevndin fult og heilt fremja tær skyldur, henni eru álagdar í hesum sáttmála, og aðalskrivarin skal kalla inn til fyrsta fundin.

12. Tekur ST-aðalfundurin undir við tí, skulu limirnir í nevndini, sum er sett sambært hesum sáttmála, verða samsýndir við ST-peningi sambært teimum treytum og umstøðum, sum aðalfundurin ger av, samstundis sum hann tá eigur at hava í huga, hvussu týdningarmikil ábyrgdin hjá nevndini er.

13. Nevndarlimirnir skulu hava rætt til teir hentleikar, tey framíhjárættindi og tað órin, sum fellur teimum serfrøðingum í lut, ið starvast fyri Sameindu Tjóðir soleiðis, sum tað er ásett í avvarðandi stykkjum í ST-sáttmálanum um framíhjárættindi og órin.

## Grein 35
## Frágreiðingar frá limalondunum

1. Øll limalondini skulu umvegis ST-aðalskrivaran lata nevndini víðfevnda frágreiðing um tey stig, ið tikin eru til at seta í verk tær skyldur, sum hesin sáttmáli leggur á tey, og um tey framstig, gjørd eru í tí sambandi, áðrenn tvey ár eru liðin, eftir at hesin sáttmáli er komin í gildi í tí einstaka limalandinum.

2. Síðani skulu limalondini lata fylgjandi frágreiðingar í minsta lagi fjórða hvørt ár og annars, hvørja ferð nevndin biður um tað

3. Nevndin ger vegleiðingar viðvíkjandi innihaldinum í frágreiðingunum.

4. Limaland, sum hevur latið ta fyrstu víðfevndu frágreiðingina inn til nevndina, hevur ikki fyri neyðini í seinni frágreiðingum at endurtaka upplýsingar, sum tað er komið við frammanundan. Tá ið eitt limaland ger frágreiðing til nevndina, verður heitt á tað at ansa eftir, at arbeiðið verður gjørt opið og týðiliga og at ásetingarnar í grein 4, stk. 3 í hesum sáttmála verða havdar í huga.

5. Frágreiðingar kunnu siga frá viðurskiftum og tvørleikum, sum gera sítt til, at ikki er komið nóg langt við at halda tær skyldur, sum hesin sáttmáli áleggur.

## Grein 36
## Meting av frágreiðingum

1. Nevndin skal meta um hvørja einstaka frágreiðing, og skal koma við uppskotum og vanligum tilmælum viðvíkjandi frágreiðingini, sum hon metir er hóskandi, og skal senda viðmerkingarnar til limalondini, talan er um. Limalondini kunnu svara nevndini aftur, við at senda allar tær upplýsingar tey ynskja. Nevndin kann biðja um fleiri upplýsingar frá limalondunum, ið eru viðkomandi fyri at staðfesta hendan sáttmála.

2. Um eitt limaland er ógvuliga seint at lata frágreiðing inn, kann nevndin boða tí limalandi, talan er um, frá, at kanning verður gjørd av ígildisetanini av ásetingunum í hesum sáttmála í avvarðandi limalandi, grundað á álítandi upplýsingar, sum nevndin hevur, um viðkomandi frágreiðingin ikki er innlatin tríggjar mánaðir eftir fráboðanina. Nevndin skal bjóða avvarðandi limalandi við upp í slíka kanning. Svarar limalandi við at lata umbidnu frágreiðingina inn, eru ásetingarnar í stykki 1 í hesi grein galdandi.

3. Aðalskrivari Sameindu Tjóða sær til, at frágreiðingarnar eru til taks hjá øllum limalondunum.

4. Limalondini síggja til, at frágreiðingar teirra eru til taks hjá almenninginum víða hvar í heimlandi teirra, og at tað lættliga slepst fram at uppskotunum og almennu tilmælunum í sambandi við hesar frágreiðingar.

5. Sum hon metir tørvin vera á tí, skal nevndin senda serstovnum, grunnum og skipanum undir Sameindu Tjóðum og øðrum skikkaðum bólkum frágreiðingar frá limalondunum so tey kunnu gera viðmerkingar til ella koma við ávísum ráðum ella stuðli, sum tørvur er á, og sum er í frágreiðingunum. Samstundis skal nevndin senda sínar egnu viðmerkingar og síni egnu tilmæli til hesar fyrispurningar og tilmæli, um hon kemur við nøkrum.

## Grein 37
## Samstarv millum limalondini og nevndina

1. Øll limalondini skulu samstarva við nevndina og hjálpa teirra limum at gera sum mest, meðan teir sita í nevndarsessinum.

2. Í viðurskiftum við limalondini eigur nevndin at hava frammarlaga í huga, hvussu og við hvørjum hon kann menna førleikan hjá ymisku tjóðunum at seta ásetingarnar í hesum sáttmála í gildi í innlendis lóggávu, herundir ígjøgnum altjóða samstarv.

## Grein 38
## Viðurskifti nevndarinnar við aðrar bólkar

1. Fyri at virka fyri eini munadyggari ígildissetan av hesum sáttmála í innlendis lóggávu, og at eggja til altjóða samstarv, í viðurskiftum sum hesin sáttmáli fevnir um:

   *(a)* Skulu serkønir stovnar og aðrar ST-undirnevndir hava rætt til at verða umboðaðar – í mun til heimildir teirra annars - tá ið metast skal um, hvussu ásetingarnar í hesum sáttmála skulu setast í gildi í innlendis lóggávu. Nevndin kann bjóða serkønum stovnum og øðrum serkønum bólkum, sum hon metir førar fyri at koma við serkønum ráðum viðvíkjandi gildisseting av sáttmálanum í innlendis lóggávu á økjum, har teir – hvør í sínum lagi - hava heimildir. Nevndin kann bjóða serkønum stovnum og øðrum ST-undirnevndum at senda inn frágreiðingar um, hvussu ásetingarnar í hesum sáttmála kunnu setast í gildi í innlendis lóggávu, viðvíkjandi økjum, ið koma inn undir teirra málsøki.

   *(b)* Tá ið hon røkir nevndararbeiði, skal nevndin í tann mun, tørvur er á tí, ráðføra seg við aðrar viðkomandi stovnar, sum altjóða mannarættindasáttmálar hava stovnsett, við tí í hyggju at tryggja, at samsvar er ímillum stevnumið, uppskot og tilmæli annars í frágreiðingum teirra, og til tess at sleppa undan dupultarbeiði og umskaring, tá ið tey røkja skyldur sínar.

**Grein 39**
**Nevndarfrágreiðing**

1. Annaðhvørt ár skal nevndin leggja fram álit fyri ST-aðalfundin og fyri Búskapar- og Sosialaráðið um tað, ið hon hevur tikist við, og kann koma við uppskotum og tilmælum annars, ið eru grundað á gjølligar kanningar av frágreiðingum og upplýsingum, ið limalondini eru komin við. Hesi uppskot og tilmæli annars skulu vera partur av nevndarfrágreiðingini saman við møguligum viðmerkingum frá limalondunum.

**Grein 40**
**Limalandaráðstevna**

1. Limalondini skulu hittast javnan til limalandaráðstevnu, fyri at meta um alt tað, sum viðvíkur at seta ásetingarnar í hesum sáttmála í gildi í innlendis lóggávu.

2. Ikki meiri enn seks mánaðir eftir, at hesin sáttmáli er komin í gildi, kallar aðalskrivari Sameindu Tjóða inn til limalandaráðstevnu. Fundirnir, sum koma aftaná, kallar aðalskrivarin inn annaðhvørt ár ella sambært tí, sum limalandaráðstevnan ger av.

**Grein 41**
**Varðveitslufólk**

Aðalskrivari Sameindu Tjóða fær litnan henda sáttmála í varðveistlu.

**Grein 42**
**Undirskrift**

Tað skal standa øllum londum og landspartafylkingum í boði at skriva undir henda sáttmála á høvuðsstøð Sameindu Tjóða í New York frá 30.mars 2007.

**Grein 43**
**Samtykkja at binda seg til**

Tey lond, ið skriva undir henda sáttmála, fáa staðfest hann við lóg, og tær landspartafylkingar, sum skriva undir, staðfesta hann formliga. Tað skal standa øllum londum ella landspartafylkingum, ið ikki hava skrivað undir sáttmálan, frítt fyri at taka undir við honum.

**Grein 44**
**Landspartafylkingar**

1. "Landspartafylking" skal merkja felagsskapur, ið sjálvstøðugu londini í einumhvørjum stórøki mynda, sum frá limalondum sínum hava fingið málsræði, tá ið tað kemur til mál, ið verða stýrd av hesum sáttmála. Í formliga váttanar- ella viðtøkuskjali sínum

skulu hesar fylkingar kunngera, hvussu langt málsræði teirra røkkur, tá ið tað kemur til mál, sum hesin sáttmáli stýrir. Síðani skulu tær siga varðsveitslufólkinum frá, verða viðurskiftini viðvíkjandi málsræði teirra munandi skerd.

2. Hugtakið "Limalond" skal í hesum sáttmála eisini fevna um slíkar felagsskapir, ið eru innanfyri mørkini av teirra málsræði.

3. Formlig skjøl, ið landspartafylking letur inn sambært grein 45, stykki 1, og grein 47, stykki 2 og 3 í hesum sáttmála, verða ikki taldar við.

4. Tá ið talan er um mál innan málsræði teirra, kunnu landspartafylkingar nýta valrætt sín á limalandaráðstevnuni við tí atkvøðutali, sum svarar til talið á limalondum teirra, ið eru partar av hesum sáttmála. Hesar fylkingar skulu ikki nýta atkvøðurætt sín, um nakað av limalondum teirra nýtir sín rætt, og øvugt.

## Grein 45
## Gildiskoma

1. Hesin sáttmáli kemur í gildi trettanda dag eftir, at tjúgunda staðfesta ella viðtikna formliga staðfestingarskjalið er latið inn.

2. Í teimum londum ella landspartafylkingum, sum hava staðfest, formliga váttað ella viðtikið henda sáttmála, eftir at tjúgunda formliga staðfestingarskjalið hesum viðvíkjandi er latið inn, kemur sáttmálin í gildi trettanda dagin, eftir at hetta teirra egna formliga staðfestingarskjal er latið inn.

## Grein 46
## Fyrivarni

1. Fyrivarni, ið eru ósambærilig við mál og mið í hesum sáttmála, verða ikki loyvd.

2. Fyrivarni kunnu verða tikin aftur nær sum helst.

## Grein 47
## Broytingar

1. Øll limalondini kunnu koma við uppskoti til broytingar í hesum sáttmála og lata aðalskrivara Sameindu Tjóða tað. Aðalskrivarin skal boða limalondunum frá øllum broytingaruppskotum og biðja tey siga sær frá, um so er, at tey eru hugað fyri limalandaráðstevnu til tess at meta um uppskotini og gera úrskurð. Um so er, at í minsta lagi ein triðingur av limalondunum – innan fýra mánaðir eftir at tey hava fingið boðini – eru hugaði fyri hesari ráðstevnu, skal aðalskrivarin kalla inn til ráðstevnuna, ið verður hildin undir ST-eftirliti. Aðalskrivarin skal senda øll tey broytingaruppskotini, sum ein meiriluti, ið telur tveir triðingar av teimum limalondunum, sum vóru á fundi og sum atkvøddu, til ST-aðalfundin til samtyktar og síðani til øll limalondini til góðkenningar.

2. Broytingaruppskot, sum hevur fingið undirtøku og sum er góðkent sambært stykki 1 í hesi grein, skal koma í gildi á tríatiunda degi, eftir at talið á formligum staðfestingarskjølum, sum eru innlatin, kemur upp á tveir triðingar av tí tali av limalondunum, sum vóru á fundi tann dagin, tá ið tikið varð undir við broytingaruppskotinum. Síðani skal broytingaruppskotið koma í gildi hjá øllum limalondunum tríatiunda dagin eftir, at tey hava latið sítt egna formliga staðfestingarskjal inn. Broytingaruppskotið skal bara vera skyldubindandi fyri tey limalondini, ið hava góðtikið tað.

3. Um limalandaráðstevnan einmælt hevur samtykt tað, skal broytingaruppskot, sum er góðtikið og góðkent samsvarandi stykki 1 í hesi grein, sum bara sipar til grein 34, 38, 39 og 40, koma í gildi fyri øll limalondini á tríatiunda degi eftir, at talið á formligum staðfestingarskjølum, sum eru latin inn, er komið upp á tveir triðingar av tí tali av limalondum, sum vóru á fundi tann dagin, broytingaruppskotið varð góðtikið.

## Grein 48
## Uppsøgn

Limaland kann siga henda sáttmála upp við skrivligari fráboðan til aðalskrivara Sameindu Tjóða. Uppsøgnin fer at virka eitt ár eftir tann dagin, aðalskrivarin hevur fingið fráboðanina.

## Grein 49
## Atkomuligt snið

Teksturin í hesum sáttmála skal gerast tøkur í atkomuligum sniði.

## Grein 50
## Frumtekstir

Arabisku, kinversku, ensku, fronsku, russisku og sponsku orðingarnar í hesum sáttmála skulu vera líka eftirfarandi.

TIL VITNIS UM HETTA hava undirritaðu ráðharrar við fulltrú, sum stjórnirnar hjá hvørjum sær á sámuligan hátt hava heimilað teimum, skrivað undir henda sáttmála.